

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 11 - 2012

# USA verður tað stóra oljuveldið

Framrokningar hjá Altjóða Orkustovninum IEA vísa, at um átta ár verður USA tað størsta oljuframleiðaralandið í heiminum. Stovnurin sigur, at tann stóri vøksturin á amerikonsku olju- og gassframleiðsluni tey seinastu árini fer at seta ferð á ymiskt búskaparligt virksemi, so Norðuramerika fær ein annan leiklut í altjóða orkuhandlinum. Men amerikanararnir verða ikki leingi í songini hjá baróninum, tí sambært IEA fer framleiðslan í Saudiarabia og hinum OPEC-londunum upp um ta amerikonsku miðskeiðis í 2020-árunum. Í sama viðfangi staðfestir orkustovnurin, at altjóða eftirspurningurin eftir olju fer at veksa tey næstu umleið 20 árini. IEA hevur fyrr sagt, at eftirspurningurin á orkumarknaðinum fer at veksa 14 prosent hetta til 2035. Sostatt kemur tann dagliga nýtslan upp á 100 milliónir tunnur um dagin, sum er 700.000 tunnur meiri, enn IEA metti fyri bara einum ári síðani. Prísurin hækkar Samstundis sum oljuframleiðslan veksur, hækkar prísurin eisini, og IEA metir, at í 2035 fer prísurin at liggja um 125 dollarar fyri tunnuna. - Eftirspurningurin í OECD-londunum fer at minka, men størri eftirspurningur í londum við stórum búskaparvøkstri so sum Kina og Inda ger, at altjóða nýtslan verður støðugt veksandi, sigur IEA.

